*Tekstur: Eydna Skaale*
*Myndir: Beinta Haraldsen*

# Style Award 2010



***Tríggjar modellir íklætnar til evnið »jørð« standa og bíða inntil tað verður teirra tørn at trína inn á pallin.***

## Backstage

Meðan alt var róligt og professionlet í stóra salinum, so varð arbeitt undir hátrýsti handan pallin. Tær 10 modellirnar skuldu stylast fullkomiliga av nýggjum til allar fýra sýningarnar, og sjálvsagt var nógv arbeiði av tí. Stylistur var kendi danin Uffe Buchard, og hann legði dent á tey fýra frumevnini eld, vatn, jørð og luft.



***Ein modell poserar handan pallin, meðan hon bíðar inntil hinar verða klárar.***



***Camilla Ottosen var vertur, og her hevur hon eina pausu handan pallin.***



***Mary krúnprinsessa hevur leingi verið sædd sum eitt av størstu donsku mótafyrimyndunum, og hon plagar eisini at vera ein íðin gestur til fleiri av mótasýningunum. Í ár hevur kongshúsið tó boðað frá, at hon ikki luttekur á vikuni, men til byrjunarshowið "Walk in Style" hevði hon eina serliga uppgávu, tí hon plagar á hvørjum ári at handa serligu heiðurslønina til ta kvinnuna, sum dómsnevndin velur, og í ár var einki undantak.***

## Ecco Walk in Style Award 2010



Ecco letur á hvørjum ári eina virðisløn til eina kvinnu í mótaheiminum, sum er íðin innan vælgerararbeiði. Virðislønin er 250.000 kr, og tað er ein serlig dómsnevnd, ið velur vinnaran millum tær 5 tilnevndu. Í ár var tað fyrrverandi polska modellin, Ilona Felicjanska, sum vann fyri sítt stóra arbeiði við heilaskaddum børnum

Heiðurslønin varð handað av Mary krúnprinsessu, og umvegis ein tulk takkaði Ilona fyri heiðurin: -Eg eri sera ærað av at fáa hesa heiðurslønina. At hjálpa er ein náttúrligur partur av mínum lívi, afturfyri alla ta eydnu eg sjálv havi upplivað. Mín hjálparfelagskapur »Forgetmenot« hjálpir børnum við Cerebral Parese og mammum teirra. 2 út av 100 børnum fáa hesa diagnosuna, men í Póllandi hava bert 1% ráð til viðgerð og venjing, greiddi Ilona frá, tá krúnprinsessan handaði henni kekkin á 250.000 kr.

Hinar tilnevndu vóru:

* Danska Malene Birger er ein víðakendur sniðgevi, sum í nógv ár hevur arbeitt við Unicef
* Týska Dana Sweiger rekur merkið Bellybutton til barnakonur, og hevur í áravís verið knýtt at týska felagnum SterniPark e.V., ið arbeiðir við vælgernadi endamálum.
* Svenska Efva Attling, fyrverandi model og tónleikari, og núverandi sniðgevi, hevur í áravís stríðst fyri javnbjóðis rættindum fyri samkynd í Svøríki. Harumframt hevur hon verið við í bardaganum um at gera heimin til eitt betri stað.
* Norska Kari Traa var í áravís ein toppstjørna innan skikappingar, og hevur vunnið fleiri heiðursmerki m.a. á Olympisku Leikunum. Hon hevur nú egna framleiðslu av skiklæðum og hjálpir í dag ungum skitalentum við at gerast betri og koma víðari.